FØROYA HANDVERKSMEISTARAFELAG

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Heilsu- og Innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Att.:

Tórshavn 11. februar 2019

Okkara tilv./Our ref.
3048-1750/Belin/Heilsu-FHMF--H
Tykkara tilv./Your ref.

## Hoyringssvar til uppskot um eltrygd

Føroya Handverksmeistarafelag hevur fingið uppskot til løgtingslóg um eltrygd til hoyringar. Føroya Handverksmeistarafelag hevur viðgjørt uppskotið og ynskir at vísa á hesi viðurskifti.

Í §23 verður heimila Elnevndini at útveita eftirlitsuppgávur. Hetta er í sjálvum sær í lagi, men tað er óheppið, at SEV verður nevnt positivt sum tann einasti útinnarin av hesum eftirlitsuppgávum. Heldur átti at staðið at: "Elnevndin kann við góðkenning frá landstýrismanninum heimila SEV ella øðrum net-felagið at"

Tað er óheppið at skriva SEV inn í lógina, sum einasti møguligi eftirlitsmyndugleiki. Vanligt er aðra staðni, at hendan uppgáva verður framd av privatum.

Vinarliga
Føroya Handverksmeistarafelag

Marius Thomassen